**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0708**
**Tíðarskeið 14/02-21/02-2007**

---

**Fólk frá FRS.:** Hallur Joensen og Regin Kristiansen.
William V. Fredericks (ein amerikanari).

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur, termistorketan og tríggir havsvívarar..

**Um túrin:** Vit fóru út hósdagin 15/2 kl.1800. Siglt varð eystur á støð N1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar norðureftir, vit tóku allan skurðin, norður á 64°30N.
Tá liðugt var at taka støðir á skurði N, sigldu vit suður á 63°44N-6°00V, har vit tóku ein Havsvívara (102) upp. Haðani sigldu vit vestur um Trøllhøvda á støð V1 og tóku so støðir út eftir skurði V.
Tá liðugt var at taka støðir á skurði V, settu vit tveir Havsvívara út (103 og 104) og tóku ein upp (101).
Haðani varð farið á skurð S og tóku vit hendan skurðin av Munkagrunninum og móti Hetlandi. Mitt á skurðinum settu vit ein Havsvívara út (105) og hildu so fram at taka støðir móti Hetlandi.
Siglt varð so norður á støð E8 og tóku vit hendan skurðin frá markinum og inn ímóti Nólsoynni. Á seks teimum seinastu støðunum tóku vit ikki glúp, vegna veður.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekk væl, hóast veðrið var stak vánaligt onkran dag á túrinum.
Vit vóru aftur á Havnini týskvøldið 20/2 kl. 1800.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 52 støðir og saltprøvar á øllum. Við glúpinum tóku vit 45 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vetur.

**Viðmerkingar:** Veirurin varð skoyttur tværferðir á túrinum.

21-02-2007 ______________________
Regin Kristiansen

Vend



Støðir og kósir á túri 0708